## UTTAN ÚR HEIMI

## Heryvirmaður fekk sekkin

Ein yvirmaður í hernaðarligu fregnartænastuni í Ísrael hevur fingið sekkin, tí hann forðaði einum ísraelskum álopi á palestinsk mál.

Sambært blaðnum Maariv hevur yvirmaðurin játtað seg sekan, og hann skal hava sagt, at hann royndi at forða einum álopi á ósekar palestinar. Yvirmaðurin er nú fluttir til eina skrivstovu hjá hernaðarligu fregnartænastuni, har hann bert hevur umsitingarligar uppgávur, skrivar Maariv.

Ísraelsk lóg áleggur annars heryvirmonnum at sýta fyri at líða boð frá sínum yvirmonnum, um teir halda, at talan kann vera um krígsbrotsverk. Síðani palestinski uppreisturin byrjaði í september í 2000, eru umleið 200 ísraelskir hermenn og yvirmenn settir í fongsul, tí teir hava sýtt fyri at gera tænastu í teimum hersettu økjunum.

## ES hjálpir Norðurkorea

Uttanríkisráðharrarnir í ES-londunum samdust fyrradagin um at senda eina sendinevnd tilæ Norðurkorea í einari roynd at loysa ósemjuna um landsins kjarnorkuætlan.

Fundurin samdist um, at Grikkaland, sum hevur formansskapin í ES, skal fáa fundin í lag og fyrireika hann, men tann endaliga ferðin er treytað av, at leiðararnir í ES-londunum taka undir við henni, og at norðurkoreanska stjórnin er hugað fyri at hitta ES-umboðini.

Hildið verður, at grikski uttanríkisráðharrin, George Papandreou, og uttanríkispolitiski samskiparin hjá ES, Javier Solana, fara at standa á odda fyri sendinevndini, men nær hon fer til Pyongyang, er ikki greitt enn.

## Jugoslavia í søguna

Serbiska tjóðartingið hevur samtykt, at Serbia og Montenegro verða skipað sum eitt samveldið, og samtyktin ber í veruleikanum í sær, at Jugoslavia endaliga er farið í søguna. 165 av teimum 250 serbisku tinglimunum atkvøddu fyri avgerðini, meðan 47 atkvøddu ímóti.

Avgerðin at skipa Serbia og Montenegro sum eitt samveldi ber eisini í sær, at serbiska forsetavalið verður útsett. Herfyri varð tvær ferðir roynt at velja forseta, men hvørgu ferðina eydnaðist tað nøkrum valevni at vinna, tí valluttøkan var ov lítil. Vojislav Kostunica fekk kortini flestar atkvøður á báðum valunum.

Serbia og Montenegro var tað seinasta, sum var eftir av gamla Jugoslavia, eftir at Kroatia, Bosnia, Makedonia og Slovenia tóku loysing í nítiárunum.

## Uppsagnir hjá Saab

Fleiri hundrað starvsfólk hjá svensku stórfyritøkuni hava fingið uppsagnarbræv seinastu tíðina.

Í november vórðu 1300 fólk uppsøgd á bilverksmiðjuni í Trollhættan, og í síðstu viku fingu 100 onnur somu boð. Skilið er tað sama á motorverksmiðjuni hjá Saab í Sødertælje. Har vórðu 100 fólk uppsøgd fyri tíggju døgum síðani.

Motorverksmiðjan í Sødertælje er partur av dótturfelagnum Saab Powertrain, og tað felagið hevur eisini boðað frá uppsagnum. Ætlandi skulu 50 starvsfólk hjá felagnum sigast upp, skrivar svenska tíðindastovan TT.

# USA umhugsar at nýta kjarnorkuvápn

**Vanligar bumbur og rakettir megna ikki at oyðileggja møguligar irakskar støðir undir jørð, og tí umhugsa amerikanarar at nýta smáar kjarnorkubumbur í einum møguligum kríggi við Irak**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Tað mangan álítandi blaðið Los Angeles Times skrivaði í gjár, at amerikanska herleiðslan umhugsar at nýta kjarnorkuvápn í einum møguligum kríggi við Irak. Kjarnorkubumburnar skulu nýtast til at oyðileggja hernaðarligar støðir undir jørð og møguligar goymslur við hópoyðingarvápnum, sum irakar kanska eisini hava bygt undir jørð, skrivar blaðið.

Serligi hernaðartíðindamaðurin hjá Los Angeles Times sigur seg hava tíðindini frá keldum í amerikansku verjuleiðsluni og skjølum, sum hevur sæð. Verjumálaráðið Pentagon hevur svarað, at USA nú sum fyrr tilskilar sær óavmarkaðan rætt til at verja seg og síni sameindu.

Seinastu tvey árini hevur amerikanska herleiðslan umhugsað at nýta smáar kjarnorkubumbur ímóti málum undir jørð. Longu undir krígnum í Afghanistan kunnaði Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri kongressina um, at tað kundi gerast neyðugt, tí tað er ein sannroynd, at amerikanska hermegin hevur havt trupulleikar við at oyðileggja støðir, sum fíggindin hevur undir jørð.

### Lærdu av Kosovo

Eitt dømi um hetta var í Kosovo í 1999. Tá hildu amerikanararnir, at teirra B2-bumbuflogfør høvdu oyðilagt øll tey serbisku flogførini í Pristina longu ta fyrstu bumbunáttina. Tá vápnahvíld fekst í lag, vísti tað seg, at serbarnir høvdu nógv MIG-flogfør standandi inni í einum fjalli.

Bæði í Irak og í Norðurkorea er ein stórur partur av hernaðarliga samskiftinum og vápnunum fjald undir jørð, og sambært einari frágreiðing, sum Pentagon gjørdi í 1991, eru umleið 10.000 slíkar støðir undir jørð ymsastaðni í heiminum, og 1400 teirra verða mettar av hava stóran hernaðarligan týdning, stóð í frágreiðingini.

Einasti háttur at oyðileggja slíkar støðir er at nýta smáar kjarnorkubumbur. Tá tosað verður um smáar kjarnorkubumbur, verður hugsað um bumbur, sum eru minni enn 5 kilotons. Til samanberingar kann nevnast, at tær báðar kjarnorkubumburnar, sum vórðu sleptar niður yvir Hiroshima og Nagasaki í 1945, vóru 15 kilotons hvør.

### Vandamikil gongd

Seinastu árini hava amerikansku hernaðarmyndugleikarnir kannað, um tað ber til at nýta tær smáu kjarnorkubumburnar uttan at beina fyri fólki í túsundatali. Hernaðartíðindamaðurin hjá Los Angeles Times skrivar, at tað er møgulit at nýta bumburnar í Irak. Hann vísir á, at tær smáu kjarnorkubumburnar kunnu nýtast til at beina fyri hópoyðingarvápnum, eins og tær kunnu nýtast til at oyðileggja herstøðir av ymsum slagi undir jørð.

Í tí seinna førinum umhugsar amerikanska herleiðslan at nýta bumburnar longu í byrjanini av einum møguligum kríggi við Irak til tess at leggja iraksku hermegina lamna.

- Verður hetta gjørt, er tað ein nýggj gongd innan krígsførslu, og tá verður gáttin til kjarnorkuvápnanýtslu munandi lægri, enn hon hevur verið. Og tað kann vera vandamikið, skrivar Los Angeles Times.

# Irak hóttir við at leypa á Kuwait



*Sambært Tariq Aziz, varauttanríkisráðharra eru Saddam Hussein og menn hansara til reiðar at leypa á Kuwait, kemur amerikanska álopið haðani*

*Mynd: Reuters*

**Loyva kuwaitar USA at nýta landið sum støð í einum álopi á Irak, fer Irak at leypa á Kuwait**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*

Irakski varauttanríkisráðharrin, Tariq Aziz, gjørdi í samrøðu við kanadiska sjónvarpið fyrrakvøldið greitt, at roynir USA at gera innrás í Irak, verða amerikansku hermenninir ikki móttiknir við blómum, men kúlum, og teir verða fyri stórum tapi, legði hann afturat.

- Kemur álopið úr Kuwait, kann tað henda, at vit fara at svara aftur. Vit fara sjálvandi at svara amerikanska álopinum, sama hvaðani tað kemur, tí vit hava loyvi at verja okkum, segði Tariq Aziz. Hann legði afturat, at Irak fer eisini at royna at raka øll mál í USA, brestur kríggj á.

Spurdur um samstarvið millum iraksku myndugleikarnar og vápnaeftirlitsmenninar hjá ST segði varauttanríkisráðharrin, at Irak er sinnað at bøta um samstarvið. Sambært Aziz eru bara tveir stríðsspurningar eftir millum iraksku myndugleikarnar og vápnaeftirlitsmenninar. Annar snýr seg um, at flogfør av slagnum U2 skulu gera eftirlitsferðir inn yvir Irak, og hin snýr seg um møguleikarnar hjá eftirlitsmonnunum at avhoyra irakskar vísindamenn.





